# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Betongkassar ella vakrir og serstakir bygningar

Sektina á hvussu tað sær út - bara tað riggar. Hetta er ein vending, ið kann brúkast sum yvirskift yvir mangt av tí, sum verður gjørt her á landi. Í hvussu er um vit skulu ganga eftir tí ein av okkara fremstu arkitektum førir fram í áhugaverdari útvarpssamrøðu nú um dagarnar. Albert Isfeld var bæði kontantur og djarvur, tá hann í umrøddu sending fanst harðliga at bæði embætisfólki og politikarum fyri teirra tørvandi áhuga fyri tí vakra og tí serstaka. Tað, sum sipað verður til, eru teir mongu bygningar, ið verða bygdir kring landið. Har tað bara verður hugsað um tað funktionella, tvs. at fáa bygningarnar at rigga til tað brúk teir nú einaferð eru ætlaðir til.

Hetta er tó bert ein síða av sakini. Hví ikki eisini hugsa um útsjóndina, tann arkitektoniska partin, sum var kjarnan í umrøddu sending. Meðan tey nógva aðrastaðni javnan skipa fyri kappingum um at fáa tann vakrast hugsandi bygningin, verður her á landi oftast bara hugsað um sjálvan brúkspartin. Heldur enn at brúka lærdóm og evni hjá okkara arkitektum, verða flestu byggiuppgávurnar latnar til verkfrøðingar og entreprenørar, sum hava til uppgávu at fáa tingini gjørd skjótt og bíliga.

Men hetta eru oftani bygningar, sum skulu standa til fleiri ættarlið ikki bara at brúka men eisini til at síggja. Føroyingar eru glaðir um og stoltir av vøkru náttúruni. Men hví kunnu vit ikki eisini gleðast um og vera stolt av teimum mongu bygningum, sum verða reistir á hvørjum ári. Hví kunnu vit ikki lata upp í hendurnar á okkara egnu ella øðrum arkitektum at brúka evni og gávur til at fáa okkum bygningar, ið kunnu vera frægd fyri eygað og sál – sum kunnu vera eitt íkast til okkara samleika og okkara felagskenslu!

Djarvi arkitekturin eftirlýsti størri virðing frá politikarum og embætisfólki fyri tí estetiska, vakra og sjáldsama, tá milliónaupphæddir verða brúktar til at byggja nýtt tað verið seg hallir, almennar bygningar ol. Hann helt fyri, at vórðu okkara fólkavaldu meira upplýst og lærd, høvdu tey eisini dugað betri at sæð hetta – at ein íløga í at brúka arkitektar er ein varandi íløga í nøkur virði, sum fara at koma okkum øllum og okkara eftirkomarum til góða.

Vit eiga eina vakra og sjáldsama náttúru. Vit eru eitt fólk við egnum máli og mentan. Hví skulu vit ikki eisini vera ein tjóð, sum við sínum bygningum leggur dent á onnur varandi virði eisini! Norðoyar Sparikassi brýtur her upp úr nýggjum. Hann útskrivar kapping fyri at fáa ein bygning, sum er meira enn ein fýrkantaður betongkassi – sum gevur okkara arkitektum eina livandi avbjóðing. Hetta er hugaligt. Okkum tørvar bygningar við kjøti og blóði – við sál. Bygningar, ið ikki bara eru brúkslutir, men sum eisini ala fram gleðis- og stoltleikakenslur.

Vit hava fleiri vakrar bygningar kring landið, har okkara egnu ella útlendskir arkitektar hava havt sína skapandi hond við. Dømi eru fleiri av okkara nýggju kirkjum. Latið okkum fylgja boðunum frá Albert Isfeld og fylgja í fótafetunum hjá Norðoyar Sparikassa. Tá byggja vit land.

**Sosialurin**

## Prinsippspurningur 2

**HANS J. HERMANSEN**
Við sjálvstýriskvøðu



Fyri einum mánaði síðan setti undirritaði fram nakrar spurningar um sonevnda blokkin og hevði í mínari fávitsku vónað at fingið svar. Enn er einki svar komið, hvørki frá honum, sum nevndur varð í greinini, ella øðrum. Er so ringt at greiða fólki frá tí? Men vit eru framvegis mong, ið fegin vilja fáa greiðu á, hvussu tað fer at bera til at bøta um landsbúskapin við minni fíggjarorku.

Av tí, at einki svar er komið enn, er mín óvissa og mín ótryggleiki um framtíðina vaksin munandi, tí um mítt egna húsarhald hevði verið rikið á sama hátt, sum landsins búskapur verður umsitin, hevði eg verið settur undir umsiting alt fyri eitt.

**Heimastýri – fullveldi**
Datt fram á fittligan bókling, ið varð givin út í árinum 2000: "Frá heimastýri til fullveldi". 3 táverandi landsstýrisfólk: Anfinn Kallsberg, løgmaður, Høgni Hoydal, landsstýrismaður, og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, hava undirskrivað hann landsstýrisins vegna. Øll 3 eru framvegis virkin í føroyskum politikki. Skal stutt tríva í okkurt av tí sera forvitnisliga, sum har er skrivað:

Á síðu 4 stendur soleiðis (endurgeving): "Skulu vit í verki standa á egnum beinum, er fyrsta treyt, at vit megna at byggja upp ein sjálvberandi búskap. Og fortreytirnar fyri hesum hava ongantíð verið so góðar, sum tær eru í dag. Okkara búskapur er ikki longur ein reinur studningsbúskapur. Í 10 ár hevur yvirskot verið í landshúsarhaldinum, og í ár verður bert um leið triðingurin av danska studninginum brúktur í samfelagnum" (endurgeving liðug).

Víðari verður sagt á blaðsíðu 26: "Blokkstuðulin er nú knappar 950 milliónir krónur. Av hesum eru farnu árini millum 300 og 400 milliónir brúktar til rakstur av tí føroyska samfelagnum".

Seinri á somu síðu stendur soleiðis: "Í ár 2000 verður minni enn ein triðingur av tí danska blokkinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd".

**Eingin dagføring – takk!**
Í 2002 samtykkja danska stjórnin og heimastýrið, at blokkstuðulin skal ikki dagførast, men minka 366,4 milliónir krónur, tí at heimastýrið yvirtekur skúlaverkið og almenna forsorg sum sermál. Ríkisveitingin í 2002 verður tí 615,5 milliónir krónur, og tað er hon enn, tí semja er millum donsku stjórnina og heimastýrið, at blokkurin skal ikki dagførast. Henda avtala varð seinast longd í desembur í fjør í eitt ár. Hvussu samsvarar hetta við, at "restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd"?

Seinastu árini, 2002-2006, er innistandandi í Landsbankanum minkað úr 2.412 mill. kr. í 1.093 mill kr. Í 2007 økist innistandandi aftur upp í 2.467 mill. kr., sum er grundað á søluna av Føroya Banka og parti av Atlantsflog. Nú sær ikki so heilt galið út, men longu í ár fer í minsta lagi ½ milliard út úr Landsbankanum, og óivað verður hallið enn størri. Vánirnar uttan um okkum tykjast ikki góðar.

Men vit hava kanska "restina, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd", ella hvat? Mær vitandi er tann peningurin farin fyri skeyti - hann er latin gevaranum aftur.

Støðan í landsbankanum.
Fíggjarstøðan 31nda desembur 2008 sær nøkulunda soleiðis út: Í Landsbankanum eru uml. 2 milliardir kr. umframt tað, ið stendur á bók í fíggjarstovni. Lánið til Íslands, kr. 300 milliónir, er ikki goldið enn. Eftir hesum sær út til, at fíggjarstøðan 31.12.2009 verður henda: Í landsbankanum stendur umleið 1,2 milliard krónur umframt innistandandi í peningastovnum, so við hesari gongdini situr landsbankastjórin á botni í bankanum og leitar eftir teimum síðstu krónunum á jólum 2011, um aðrar inntøkur verða ikki funnar.! Skal føroyingurin sova róliga, meðan løgtingslimir hava úr at gera við at geva hvør øðrum skyldina fyri syndarligu støðuna?

Við hvørjum rætti frásigur landsstýrið sær út við 1 milliard krónur, sum føroyski borgarin eigur? Við hvørjum rætti avmarkar landsstýrið donsku veitingina til serforsorgina og fólkatrygdina, sambært avtalu 21. desembur 2001?

**Harri ella tænari?**
Føroya fólk hevur rætt til at fáa greiðu á hesum, tí enn tosa flestu politikkarar eitt mál, sum mong hava ilt við at skilja. Gjógvin millum veljaran og tey fólkavaldu tykist vaksa. Tit, ið manna Føroya Løgting og landsstýrið, eru komin upp á hægsta politiska tindin í Føroyum. Tykkara uppgáva er ábyrgdarfull. Tað er ein spurningur um álit. Tit hava boðið tykkum fram til at tæna fólkinum ábyrgdarfult. Vísið í verki, at tit eru uppgávuna vaksin - um tit eru hana vaksin!

**E.S.:** Prinsippspurningur 3 kemur um umleið ein mánað og fer at snúgva seg um avtaluna 21. des. 2001 við danska Socialministeriet – um einki nøktandi svar er komið, og Prinsipp+spurningur 4, um einar 2 mánaðir, fer at vísa, hvussu nógvur peningur er latin dønum aftur í sambandi við niður-frystingina av blokkinum.

## Hov, hov, stop en halv!

**HANS J. HERMANSEN**
Við sjálvstýriskvøðu



Nú tveir danskir fólkatingslimir tosa um føroyskan ES-limaskap - annar í eyst og hin í vest - hevði verið áhugavert hjá okkum, ið her búgva, at frætt eitt sindur um fyrimunir, vansar og um framtíðarætlanir fyri Føroyar og fyri føroyingar. Tí Føroya løgting er framvegis hægsti myndugleiki? Ætla tit at taka okkum føroyingar við? Komið niður á jørðina!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.